# Skrásetingarskjal til Vinnuskránna

TAKS

**Fráboðanin er fyri**

| | |
|---|---|
| ☐ Skráseting 1. ferð | ☐ Broytingar |

## 1. Virki

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Hjánavn / c/o: | Postrúm: |
| Gøta og nr.: | Telefon/Fartelefon: |
| Postnr. og bygd/býur: | Telefaks: |
| Kontunr. á giru ella í peningastovni: | T-postur: |

| | |
|---|---|
| Møgulig postadressa: | Møguligur grannskoðari: |

## 2. Virksemi

| | | |
|---|---|---|
| Felagið stovnað: | Rakstur byrjar: | Rakstur endar: |
| Er virksemi hjá øðrum virki yvirtikið? ☐ Ja ☐ Nei, Um ja, vinarliga svara spurningunum niðanfyri | | |
| Yvirtøkudagur: | V-tal hjá yvirtikna virkinum: | Navnið á yvirtikna virkinum: |

## 3. Virkið skal skrásetast fyri fylgjandi skyldur

| | | |
|---|---|---|
| ☐ Meirvirðisgjald | MVG-skyldugt virksemi byrjar: | MVG-skyldugt virksemi endar: |
| ☐ Lønhæddaravgjald (heilsu-og fíggjarvirksemi) | Lønhæddaravgjaldsskyldan byrjar: | Lønhæddaravgjaldsskyldan endar: |
| ☐ Brennioljuavgjald (inngjaldari) | ☐ Ferðaavgjald | ☐ Framleiðsluavgjald |
| ☐ Vinnuligur innflytari | ☐ Lønávísari | ☐ Annað ..................................... |

## 4. Virkisháttur

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ☐ Einstaklingafyritøka | ☐ Partsreiðarí | ☐ Íognarfelag | ☐ Keypsamtøka | ☐ Útlendskt felag | ☐ Lutafelag |
| ☐ Kommunalur stovnur | ☐ Partafelag | ☐ Smápartafelag | ☐ Samløgufelag | ☐ Almennur stovnur | ☐ ............... |

## 5. Vinnugrein: (Skal ásetast) – meiri um vinnugreinir sæst í yvirlitinum um Føroysku Vinnugreinaskipan

| |
|---|
| Høvuðsvirksemi: |
| Hjávinna: |
| |
| |

# Skrásetingarskjal til Vinnuskránna

## 6. Eigarar, ábyrgdarar o.a.

| P-tal ella V-tal (fyri feløg) | Navn | Eigari | Stjóri | Umboðs fulltrúi | Frádagf. |
|---|---|---|---|---|---|
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |
| | | ☐ | ☐ | ☐ | |

## 7. Eigarar virkisins (fyri feløg: eigarar felagsins)

1. Ert tú høvuðspartaeigari ella eigur tú í øðrum virki? ☐ Ja ☐ Nei
2. Hevur tú verið eigari av, limur í nevnd ella stjóri á øðrum skrásettum virki seinastu 5 árini? ☐ Ja ☐ Nei

Um ja til 2., vinarliga svara spurningunum niðanfyri

| | | | |
|---|---|---|---|
| ☐ Partaeigari | V-tal: | ☐ nevndarlimur | V-tal: |
| ☐ Stjóri | V-tal: | ☐ | V-tal: |

## 8. Tilmelding til sjálvgreiðsluna Vinnugluggin (Bæði eMVG- og eToll-skipanin eru við í Vinnuglugganum)

Ynskja tygum at gerast brúkari av Vinnuglugganum? ☐ Ja ☐ Nei

Um ja, kanst tú heinta umsóknarblaðið VG01 niður frá heimasíðuni hjá TAKS og senda tað inn saman við skrásetingarblaðnum ella sendir TAKS umsóknarblaðið til virkisadressuna

____________________ , tann / 20 ____________________

Staður — Undirskrift av ábyrgdarleiðara hjá virkinum

Skal sendast til: TAKS, Postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, við faksi 35 26 01 ella við t-posti: taks@taks.fo

# Skrásetingarskjal til Vinnuskránna

## Vegleiðing at útfylla skrásetingarskjalið

Hetta skrásetingarskjalið verður nýtt til at skráseta virksemi við, og eisini at broyta skráseting sambært
- Meirvirðisgjaldslógini
- Lóg um lønhæddaravgjald
- Skattalógini §§ 120 og 125
- Kunngerð nr. 88 frá 30 mai 1994 um upplýsingarskyldu sambært skattalógini viðvíkjandi rentum.v.m.
- Bókhaldsskyldulógini
- Og øðrum lógum og kunngerðum

Lógir og kunngerðir eru at finna í lógasavninum á heimasíðuni hjá TAKS **www.taks.fo**
Skjalið skal sendast TAKS í viðkomandi øki **í seinasta lagi 8 dagar**, áðrenn farið verður undir virksemið.

**Bókhaldsskyldulógin**
Allir persónar, øll virki og feløg, ið reka vinnu, og sum eru nevnd í lógini, hava skyldu at føra bókhald og lata inn roknskap á hvørjum ári.

**Skrásetingarprógv**
Tá eitt virki er skrásett, verður eitt skrásetingarprógv sent virkinum yvir tær skyldur, virkið er skrásett fyri.

**Broytingar/rættingar**
Rættingar til adressur v.m. **skulu** fráboðast Vinnuskránni. (Tað er ikki nóg mikið at boða fólkayvirlitinum frá.)
Broytingar, herundir uppathald (skjal M39), **skulu** fráboðast innan 8 dagar, áðrenn broytingarnar taka við.
Broytingar hjá feløgum, ið eru skrásett hjá Skráseting Føroya, verða bert broyttar við fráboðan frá Skráseting Føroya.

## Vegleiðing til teir einstøku teigarnar

### 1. Virki
Her verður upplýst, hvør skal skrásetast í vinnuskránni. Tvs. navn, bústaður, o.s.fr.

### 2. Virksemi
Byrjunardagur er tann dagur, farið verður undir virksemi, uttan mun til um fólk eru sett í starv ella ikki.

### 3. Virkið skal skrásetast fyri fylgjandi skyldur
Her skal boðast frá, um virksemið er MVG-skyldugt, ella lønhæddaravgjaldsskyldugt og um virki er lønávísingarskyldugt.

**Meirvirðisgjald**
Virkið skal bert MVG-skrásetast, um tað er vinnuligt sambært MVG-lógini §1.
Í hvørjum einstøkum føri fer málsviðgerð fram, um virksemið er MVG-skyldugt sambært MVG-lógini §1.
Fyri at fáa rætta málsviðgerð er í flestum førum neyðugt at lata inn eina rakstrarætlan.
Virki skulu vanliga gjalda meirvirðisgjald hvønn ársfjórðing.
Virkið fær eina MVG-uppgerð 4 ferðir um árið, og virkið skal innan 1 mánað og 10 dagar aftaná endan á einum avgjaldstíðarskeiði lata hana innaftur og avrokna. **Uppgerðin skal altíð latast innaftur, eisini um uppgerðin er "0"**.
Um avgjaldstíðarskeiðið skal broytast, skal virkið søkja um tað á skjali M18**.**

**Lønhæddaravgjald**
Løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald ásetur í § 1, at um so er, at talan er um:
1. læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og aðra veruliga heilsurøkt,
2. tryggingarvirksemi og
3. banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi
sum lata tænastur móti samsýning, hava skyldu at gjalda lønarhæddaravgjald til landskassan.

**Framleiðsluavgjald**
Løgtingslóg nr. 19 frá 12.mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi.
Fyri vørur, ið verða fluttar inn, skal avgjald rindast til landskassan sum ásett er í frumskjali 1, 2 og 3 til Toll- og vøruskránna.
Fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar til sølu, skal avgjald rindast landskassan, sum ásett er í frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna.
Framleiðsla av teimum vørum í vørunummar 2202.10.19 er tá framleiðslan fer fram á bryggjarínum.
Uppgerð skal gerast hvønn mánað sær á skjali AV01 sum finst á heimasíðuni hjá TAKS.

**Brennuoljuavgjald**
Virkið er útvegari og innkrevjari av brennioljuavgjaldi sambært løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju.

# Skrásetingarskjal til Vinnuskránna

**Ferðaavgjald**
Virkið skal heinta inn og avrokna ferðaavgjald sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. mars 1988 um ferðagjald.

**Arbeiðsgevaragjøld og ómaksgjald**
Tá arbeiðsgevari flytur starvsfólkunum løn, áliggur honum eisini at gjalda til m.a. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, umframt gjald til Barsilsgrunnin og Vinnusjúkugrunnin.

Nú peningastovnarnir hava lagt sína skipan um, ber ikki longur til hjá TAKS at taka peningin av konto arbeiðsgevarans, samstundis sum lønin verður flutt, so nú fáa allir arbeiðsgevarar rokning upp á gjaldið. Peningastovnarnir hava tó stovnað teir arbeiðsgevarar, ið hava latið TAKS fulltrú, áðrenn peningastovnarnir løgdu sína skipan um í Rokningadeplinum hjá Elektron. Hendan avtalan virkar soleiðis, at tá arbeiðsgevarin fær rokningina, nýtist honum ikki at gera nakað, um onki inngjaldskort er við, tí so verður gjaldið goldið um Rokningadepilin.

Hinvegin skulu teir arbeiðsgevarar, ið fáa rokning við inngjaldskorti, rinda rokningina umvegis peningastovnin, men ynskja teir, at rokningin framyvir verður goldin, samstundis sum lønin verður flutt, kunnu teir melda seg til Rokningadepilin hjá Elektron.Tilmeldingin verður gjørd á heimasíðuni hjá Elektron www.elektron.fo undir "Rokningadepilin".

**Skráseting í vinnuskránni, viðførir harumframt, at V-talið kan nýtast til innflutning, í peningastovnunum og í øðrum samskifti við tað almenna.**

## 4. Virkisháttur

**(1) Einstaklingafyritøka**
Navn og p-tal á handhavanum skal upplýsast á skjalinum. Handhavarin skal undirskriva skjalið.
**(2) Partsreiðarí**
Navn og p-tal og V-tal (fyri feløg) á øllum partshavarum skulu upplýsast. Allir partsreiðararnir ella leiðandi reiðarin skulu skriva undir. Um bert leiðandi reiðarin skrivar undir, skal avrit leggjast við av tí skrásetingarfráboðan, ið er givin Skipaskrásetingini. Navn og bústaður hjá leiðandi reiðaranum skal síggjast í hesi fráboðan.
**(3) Íognarfelag (Í/F)**
Navn og p-tal á øllum íognarunum skal upplýsast. Um ein ella fleiri av íognarunum eru feløg, skal v-tal upplýsast. Oyðublaðið skal undirskrivast av øllum íognarunum ella av honum (teimum), sum hevur(hava) tekningarrætt. Útskrift av tekning og avrit av møguligum áhugafelagssáttmálum skal leggjast við.
**(5) Útlendsk virki**
Sambært meirvirðisgjaldslógini og lóg um lønhæddaravgjald skulu útlendsk virkir, ið reka avgjaldsskyldugt virksemi her á landi, og sum ikki hava deild ella líknandi her, skrásetast við einum persóni, ið býr her, ella við einum felagi, ið hevur heimstað her. Undantikin eru virkir, hvørs søla í síni heild er til føroysk virkir, sum kunnu rokna avgjaldið við í sítt inngangandi avgjald.
Fráboðanin skal umframt upplýsingar um útlendska virkið, eisini innihalda upplýsingar um umboðsmannin í Føroyum, m.a. um p-tal ella v-tal.
Tað útlendska virkið skal undirskriva skrásetingarskjalið, og umboðið her á landi skal undirskriva skjal M06 (skuldbindingarreglur við skráseting av útlendskum virkjum).
Fráboðanin skal undirskrivast av útlendska virkinum.
**(8)+(9) Parta- og smápartafelag u/stovnan**
Navn og p-tal á øllum stovnarum skal upplýsast. Um eitt felag er ein- ella samstovnari í einum felagi, skal v-talið upplýsast. Avrit av stovningarskjalinum og viðtøkur skulu leggjast við. Oyðublaðið skal skrivast undir av øllum stovnarum ella av tí (teimum), ið hevur (hava) tekningarrætt.
**Parta- og smápartafelag, ið eru skrásett hjá Skráseting Føroya**
Oyðublaðið skal skrivast undir av stjóra felagsins ella honum (teimum), ið hevur (hava) tekningarrætt. Eisini skal leggjast við viðtøkur og stovningarsamtykt fyri felagið.
**(10) Samløgu(kommandit)felag**
Navn og p-tal á øllum stovnarum skal upplýsast. Um ein ella fleiri av íognarunum eru felag, skal v-talið upplýsast. Oyðublaðið skal undirskrivast av øllum íognarum ella av tí (teimum), ið hava tekningarrætt, og avrit av samløgusáttmála skal leggjast við.

**Aðrir virkishættir**
Fevnir m.a. um: deyðsbúgv, konkursbúgv, útlendsk partafeløg, deildir av útlendskum feløgum, onnur útlendsk virkir, brúkarafeløg, feløg við avmarkaðari ábyrgd, keypsfeløg, framleiðslu- og sølufeløg, tvívegis, tryggingarfeløg, akkumulerandi íløgufeløg, onnur feløg, sjálvsognarstovnar, sjálvsognarstovnar við almennum studningi, sparikassar, grunnar og stovnar.

## 5. Vinnugrein

Skriva høvuðsvirksemi hjá virkinum. Harumframt **skal** útgreinast, hvat virksemið fevnir um.
Um skrásetingarskjalið bert er galdandi fyri ein part av einum virki (deild ella tílíkt), sum ynskt er at fáa skrásett fyri seg, er tað hesin parturin av virkseminum í virkinum, ið skal fráboðast á skjalinum. Tað ber til at kunna seg um vinnugreinirnar í yvirlitinum um Føroysku Vinnugreinaskipan

### 6. Eigarar, ábyrgdarar o.a.
Her verður upplýst, hvør eigarin er/hvørjir eigarnir eru, um talan er um einstaklingavirki, íognarfelag ella partsreiðari ella annað, har V-talið er knýtt beinleiðis at einum ella fleiri likamligum persónum.
Fyri juridiskar persónar verður upplýst, hvør hevur heimild at binda felagið/felagskapin móti TAKS.
Fyri útlendsk virki, sum skulu MVG-skrásetast, skal upplýsast, hvør skal verða MVG-umboð.

### 7. Eigarar virkisins (fyri feløg: eigarar felagsins)
**Høvuðspartaeigari**
Høvuðspartaeigari er tann, sum onkuntíð innan fyri tey seinastu 5 árini, sjálvur ella saman við niðanfyri nevndu persónum hevur átt 25% ella meira av partapeninginum ella havt ræði yvir meira enn 50% av atkvøðuvirðinum.
Tá staðfestast skal, um man er høvuðspartaeigari, verður talt við partabrøv, sum er ogn hjá hjúnafelagnum, foreldrum abbum og ommum, umframt hjá børnum og barnabørnum og hjúnafelagum hjá hesum ella deyðsbúgv eftir nevndu persónum.
Partabrøv, sum ein fyrrverandi hjúnafelagi hjá omanfyri nevndu persónum hevur átt, og partabrøv, ið ein núverandi hjúnafelagi hjá teimum omanfyri nevndu persónum hevur selt áðrenn giftuna, verða ikki roknað við. Harumframt verða partabrøv tald við, sum hoyra til feløg, har frammanfyri nevndu, orsakað av partabrævaogn, viðtøkum, avtalu ella felags leiðslu, hava havt eina avgerandi ávirkan.

### 8. Tilmelding til sjálvgreiðslur
Um ynski er, ber til beinanvegin at tilmelda seg til sjálvgreiðslurnar hjá TAKS, nevnliga eToll og eMVG.
Hetta ger tað gjørligt at innlata og avgreiða MVG-uppgerðir heimanífrá umvegis netið. Til ber at melda fleiri brúkarar til skipanina.
Við at tilmelda seg eToll skipanina kann innflytarin sjálvur tollavgreiða/rinda og skriva útflýggingarloyvið umvegis netið. Til ber at melda fleiri brúkarar til skipanina.

Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av ábyrgdarleiðara hjá virkinum.